Kyndil-Neistin 24-26 (12-9):

# Stríðsviljin sigraði

**Við nýtilkomna John Petersen á odda eydnaðist tað Neistanum at basa grannunum úr Kyndli í einum dysi, har stríðsviljin var avgerandi fyri útfallið**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Í leygardagsútgávu okkara skrivaðu vit, at hóast Neistin higartil í ár hevði staðið seg nakað betri enn grannarnir úr Kyndli, so mundi vera lítið at ivast í, at Kyndil var favorittur til dystin sunnudagin. Hetta var serliga grundað á, at Áki Mørk í vikuni varð skurðviðgjørdur í fótliðinum, og at Neistin tískil mátti vera týdningarmikla miðspælaran fyriuttan.



*Hóast tað í stórum pørtum av dystinum var Kyndil, sum hevði betra takið, so fekk Neistin bæði stigini. Fyrst og fremst takkað verið einum ótrúligum stríðsvilja og so sjálvandi eisini John Petersen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## John gjørdi munin

Maður kemur tó í mans stað, og soleiðis var eisini hjá Neistanum. John Petersen hevur ikki gjørt tað stóra við hondbóltin í vetur. Og gitingarnar hava fleiri ferðir sent hann til venjingar hjá bæði StÍF og Neistanum, men fram til sunnudagin hevði tó einki hald verið í hesum.

Hesa ferð var tó álvara, og millum teir, sum tóku sæti á beinkinum hjá Neistanum, tá farið varð undir dystin, var John Petersen, men tað var tó ikki so leingi, at hann sat á hesum plássinum.

Fyrstu løtuna tóktist nevnliga eingin ivi vera um, at her ætlaði Kyndil sær tvey stig. Í verjuni høvdu teri ikki stórvegis trupulleikar av at halda neistamonnunum, og í álopspartinum skoraðu teir nærum eftir vild, tá teir ferð eftir ferð spældu seg leysar ígjøgnum bláu verjuna.

Eftir fyrsta korterið var støðan soleiðis 8-3 til Kyndil, men við innskiftingini av »nýggja« leikaranum, kom eitt slag av vend í. Fýra mál á rað frá John sendu Neistan inn aftur í dystin, men hóst øktan spenning, so fingu teir bláu ikki veruliga fatur á grannunum.

Tað líktist eisini einum slag av sálarligum knockout, tá Neistin ikki megnaði at gera sær dælt av langari yvirtalsstøðu. Onkursvegna fingu dómararnir eina gjøgnumbrotsroynd hjá Helga Justinussen til at merkja tveir fingrar til bæði Jónleif Sólsker og Jacob Jónsson, men hóast teir í tveir minuttir spældu fýra ímóti seks, so megnaði Kyndil at halda muninum niður til Neistan. Og tá teir so eisini øktu eitt lítið vet um hendan í seinastu minuttunum undan steðginum, mundi hóast alt vera líkt til, at hetta skuldi Kyndil taka sær av.

Ikki minst tí spæl teirra sá nógv meira ómaksleyst út enn tað hjá Neistanum, sum nýttu nógvar kreftir til hvørt einasta mál,

## Funnu einki mótspæl

Fyrstu løtuna hótti Neistin tó við at koppa øllum hesum á høvdið, tá teir við buldur og brak stríddu seg framum mótstøðuna, men spakuliga kom Kyndil aftur á rætta lagið. Hálvan hálvleik fyri leiklok høvdu teir aftur eina fýra mál stóra leiðslu, men so drógu teir púrasta svart.

Neistin fekk aftur verjuna at rigga, og Zeljko Jotic, sum annars hevði staðið ein góðan dyst, togaði avrikið enn longur upp, og so kundi tað gera tað sama, hvussu Kyndil kom ígjøgnum. Fríri leikarar, brotskøst og skot útifrá. Alt varð tikið, og við eitt vóru teir bláu nú frammanfyri. Nakað sum Kyndil ongan tíð veruliga megnaði at svara ímóti.

Neistin vann sostatt seinasta korterið 10-4, og tað var eisini hetta, sum avgjørdi dystin, og eftir kunn teir í Kyndli so sita og gruna, hví tað gekk, sum tað gekk.

Ein orsøk var tó heilt víst stríðsviljing, sum Neistin hevur sett í hásætið í ár. Hóast liðið sjálvsagt er tengt at avrikunum hjá einstaklingunum á liðnum, so er tað ein fyri allar og allir fyri ein, tá farið verður á vøllin. Døpru løturnar vóru fleiri sunnudagin, tá útlitini fyri einum sigri vóru millum lítil og eingi, men skarvurin varð tó ongan tíð givin yvir.

Hjá Kyndli var støðan júst hin øvugta. Størsta partin av dystinum høvdu teir tamarhald á tí, sum gekk fyri seg, men tá Neistin kortini stríddi seg aftur í dystin, høvdu teir einki stig at taka ímóti hesum. Og so høvdu teir heldur ikki John Petersen, sum kom, sá og sigraði.

### Dysturin í tølum

**Kyndil-Neistin 24-26 (12-9):**

Málskjúttar

Kyndil: Hans Áki Dal-Christiansen 8, Jónleif Sólsker 5(4), Høgni Klein 4, Jacob Jónsson 2, Regin Johannsen 2, Heini Bendtsen 2, Janus Einar Sørensen 1, Finnur Hansson 1

Neistin: John Petersen 11, Ragnar Stakksund 4, Birgir Kass 3, Kári Mortensen 2, Dann Thorleifsson 2, Morgan Knezevic 2, Helgi Justinussen 2

Brotskøst: Kyndil 7, Neistin 3

Útvísingar: Kyndil 5, Neistin 6

Diskvalifikatión: Neistin 1 (3X2 minuttir)

Dómarar úr H71: Jákup Símun Simonsen & Bárður Brimvík. Kundi helst verið betri til tíðir, men tykjast hava evnini at halda høvdið kalt, og við fleiri dystum verður samspælið eisini betri.

Tjaldur-VÍF 20-34 (10-19):

# VÍF byrjar ovast

**Bæði Neistin og StÍF kunnu enda framman fyri VÍF í grundspælinum, men tá endaspælið byrjar verða vestmenningar fremstir**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hesum syrgdu VÍF fyri við 99% vissu, tá teir sum fyrsta liðið endaðu grundspælið hjá monnum. Sigurin merkir fyri VÍF, at teir enda grundspælið við 17 stigum, og tó at Neistin og StÍF kunnu koma upp á 18 stig, so hava tey langt ífrá eins góðan málmun sum VÍF, og málini standa eftir, tá farið verður undir endaspælið.

## Ongin mótverja

Í Runavíkini var annars ongan tíð nakar sum helst ivi um, hvat liðið var tað sterkara. Eins og í Vestmanna í fyrra dystinum, so rendi Tjaldur seg alt fyri eitt í eitt satt ódnarverður, og tá vanligi málverjin framvegis hevur leikbann, so var heldur eingin at fremja ómøguligu bjargingarnar, sum skuldu til, um liðið skuldi koma bara so nøkunlunda heilskapað úr dystinum.

Og so gekk alt soleiðis á leið, sum ein kundi rokna við. Hóast teir í longum løttum taka sær meira ella minni av løttum, so øktu vestmenningarnir bara um leiðsluna, soleiðis at munurin var 14 mál, tá alt var liðugt. Við hesum kemur samlaði málmunurin hjá VÍF upp á 80 mál. Júst tað tvífalda av málmuninum hjá StÍF, og tað er so nokk ikki nakað, sum verður tikið aftur við einum einstøkum dysti, so vestmenningar kunnu longu fyrireika seg til heitið sum oddalið.

Í Tjaldrinum er tað meira hin endin av stigatalvuni, sum hyggjast skal at. Í løtuni eru runavíkingar saman við hoyvíkingum isoleraðir í botninum við fýra stig fyri 11 dysir, og júst hesi bæði liðini hittast í seinasta dystinum í grundspælinum.

### Dysturin í tølum

**Tjaldur-VÍF 20-34 (10-19)**

Málskjúttar:

Tjaldur: Dragisa Stojovic 8, Jens Martin Knudsen 6, Trúgvi Mortensen 2, Áki L. Hansen 2, Tórhallur Thomsen 1, Ken Børentsen 1

VÍF:

Áki Olsen 11, John Zachariasen 7, Ingi Olsen 5(1), Ólavur Brimnes 3, Agnar Joensen 3, Áki G. Olsen 2, Regin Didriksen 1, Petur Fr. Joensen 1(1), Fríðbjørn Seloy 1

Brotskøst: Tjaldur 1, VÍF 2

Útvísingar: Tjaldur 1, VÍF 2

Diskvalifikatión: Tjaldur 1 (Beinleiðis reytt)

Dómarar úr Neistanum: Kristian Johansen & Sámal Hansen



Stjørnan-VB 24-21 (12-13):

# Danijela avgjørdi

**Leikandi venjarin hjá Stjørnuni, Danijela Ercevic, sýndi til fulnar, hvussu stórur týdningur hennara er fyri liðið, tá Stjørnan á heimavølli koppaði oddaliðnum úr Vág**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir sorandi tapið fyri viku síðani í Vestmanna mundu tað vera tey fægstu sum roknaðu við, at Stjørnan skuldi gera nakað við oddaliðið úr Vági, tá hesar vitjaðu í Klaksvík sunnudagin.

Tað var tó ein stórur munur á Stjørnuni ta ferðina, og so nú sunnudagin, og tann munurin er Danijela Ercevic.

Sjálvandi er eitt lið meira enn ein einstakur leikari, men týdningurin sum hon hevur fyri liðið, bæði sálarliga og ikki minst leikliga man vera fult og heilt undirstrikaður, nú liðið innan eina viku hevur leikt tveir somikið ymiskar dystir.

## Mansverjan avgjørdi

Frá teirri løtu at dysturin byrjaði, lá tað mest sum alla tíðina í luftini, at hetta fór ikki at gerast nøkur løtt uppgáva hjá VB. Stjørnan syrgdi rættiliga skjótt fyri, at vanligu toppskjúttarnir hjá VB ikki sluppu framat serliga nógvum skotroyndum, og tó at tær meira ella minni mansvardu hesar største partin av dystinum, so megnaðu eftirverandi VB-leikararnir í ov lítlan mun at gera sær dælt av plássinum, sum íkom av hesum.

Júst hetta hevur annars í fleiri førum verið stóra styrkin hjá VB, og í leikarum sum Gurið Mortensen, Arnleyð Hjelm og Lailu Jespersen, hevur liðið nakrar gjøgnumbrotssterkar leikarar, sum ikki tørvar so nógv pláss fyri at gera um seg, men sunnudagin í Klaksvík vildi einki bera til.

Eitt lítið skifti undan steðginum gjørdi VB eina roynd at toga seg leyst av Stjørnuni, og tað eydnaðist eisin i at økja um munin fyrstu løtuna eftir steðgin. Men eftir at Stjørnan í seinna hálvleiki svaraði aftur, gekk meira enn striltið hjá gestunum. Ikki minst tá VB um saman mundi misnýtti tvær ferðir av sjey-metra blettinum. Heldur ikki hjálpti tað, tá tær royndu at kopiera taktikkin hjá Stjørnuni við at mansverja Danijelu. Ístaðin kundi Stjørnan seinastu løtuna avgera dystin við trimum málum á rað.

## Broyttar støður

Fyri Stjørnuna var talan fyrst og fremst um enn ein sigur, sum varð grundaður á stríðsviljan hjá einstøku leikarunum. Kanska hevur stórtapið í Vestmanna eisini tikið fast hjá ærukæru leikarunum, soleiðis at tær vildu reisa, so skjótt høvdið beyðst.

Hvussu er og ikki, so hevur Stjørnan – nú grundspælið er um at vera liðugt – lyft seg væl og virðiliga úr leiklutinum sum botnlið. Nakað sum annars sá út til at gerast teirra. Við sigrinum á VB tók liðið seg nevnliga upp á triðja plássið á stigatalvuni, og við tveimum dystum eru møguleikarnir eisini at vinna seg longur upp. Hetta verður tó trupult, tí talan er um útidystir móti teimum báðum liðunum, sum liggja beint undir Stjørnuni, men hinvegin kann liðið við hesum eisini lyfta seg nær avgjørda oddinum.

Fyri VB var tapið kanska ikki nøkur katastrofa. Tær eru framvegis fremstar í grundspælinum, og við einum dysti móti Tjaldri í bakhondini er lítið at ivast í, at teir eisini eru fremstar, tá farið verður undir grundspælið.

Men tað er einki at ivast í, at hetta ikki júst var eftir bókini fyri teirra viðkomandi. Enn restar ein sera trupul útidystur í Vestmanna, og tí kann væl vera, at munurin til næsta liðið bert verður eitt stig, tá endaspælið byrjar. Og tó at tær í VB alla tíðina hava roynt at halda lágan profil, so er hetta helst í minna lagi, tá hugsað verður um útgangsstøðið, sum liðið hevði fyri tveimum vikum síðani, tá tær framvegis høvdu fult stigatal.

### Dysturin í tølum

**Stjørnan-VB 24-21 (12-13)**

Málskjúttar:

Stjørnan: Danijela Ercevic 11(2), Natasha Stamenkovic 6, Bára S. Klakstein 3, Davina Sundskarð 2, Una Olsen 2, Jastrid Gullaksen 1

VB: Daiva Tuomaite 6(1), Reda Kurkauskiene 5, Gurið Mortensen 4, Laila Jespersen 3, Arnleyð Hjelm 1, Guðrun Midjord 1, Eyðbritt Krosslá 1

Brotskøst: Stjørnan 2, VB 3

Útvísingar: Stjørnan 3, VB 1

Dómarar úr KÍF: Jákup Dam & Vagnur Johannesen.



*Danijela Ercevic var aftur at síggja á liðnum hjá Stjørnuni, og meira enn nøkur onnur var tað hon, sum gjørdi munin, tá Stjørnan reistist eftir greiða tapið seinasta vikuskifti*

*Mynd: SáH*

# Balling á veg til Horsens



*Tað røkist í løtuni ikki fyri, at Ulrik Balling verðru at síggja aftur í føroyskum fótbólti komandi kappingarárið*

**Fyrrverandi álopsspælarin hjá NSÍ tosar við felagið hjá Johan B. Hansen um samstarv**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Tað hevur ikki verið sagt at vera ætlanin, at Ulrik Balling skuldi koma aftur til NSÍ. Tá ið álopsspælarin eftir kappingarenda í heyst fór úr Runavík, helt hann dyrnar á gloppi samstundis, sum hann ásannaði, at hann leitaði eftir nýggjum arbeiðsgevara í Danmark ella kanska onkra aðra staðni.

Hóast Ulrik Balling skoraði eitt mál í hvørjum av teimum fýra landskappingardystunum, sum hann var partur í, og hóast hann eisini skoraði í steypafinaluni ólavsøkudag, so vóru teir í NSÍ ikki so ógvuliga spentir at gera nýggjan sáttmála. Orsøkin var m. a., at Ulrik Balling ein stóran part av tíðini var skaddur, meðan hann var í NSÍ.

Nú tykist tað, sum um álopsspælarin, sum í síni tíð var á yngru landsliðunum í Danmark, hevur fingið samband við nýggjan arbeiðsgevara. Sambært donskum fjølmiðlum, so tosar Ulrik Balling um samstarv við AC Horsens, sum spælir í næstbestu deildini. Talan er um sama felag, sum Johan B. Hansen spælir í. Fyrrapartin av níti árunum vóru tveir aðrir føroyskir landsliðsspælarar í Horsens. Teir vóru Jan Allan Müller og Jens Erik Rasmussen.

Akkurát nú heldur Ulrik Balling frí í Thailandi. Hann sigur seg vera sera áhugaðan at spæla í Horsens, sum leitar við lykt eftir einum nýggjum álopsspælara.

– Í løtuni nýti eg frítíðina. Mikudagin komi eg heim aftur til Danmarkar. Eg havi tosað við venjaran, Kent Nielsen og ítróttarstjóran Jesper Hansen. Teir søgdu seg vera áhugaðar í at knýta meg afturat liðnum, og eg segði, at eg var áhugaður í at spæla í Horsens. Vit eru ikki komnir longri enn har til. Men hetta er eitt gott útgangsstøði fyri samráðingum, tá ið eg eri komin aftur úr Thailandi, sigur Ulrik Balling við Horsens Folkablad.

Um Ulrik Balling flytir til Horsens, so verður hetta ikki fyrsta ferðin, at hann fer at skifta felag. Umframt at hava spælt í NSÍ og í Vejle, so hevur hann eitt nú verið í Næstved, Aarhus Fremad og í norska Tromsø.

Horsens Folkablad tykist ikki vera so ógvuliga væl kunnað um føroyskan fótbólt og føroysk viðurskifti yvirhøvur. Teir vita at siga, at NSÍ er eitt av fótbóltsfeløgunum í Tórshavn!